

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 03 - 2012

# Stoltenberg í kjalarvørri víkinga

Norski forsætisráðharrin Jens Stoltenberg kemur til Føroya umleið 18. mai á eini ferð í kjalarvørri víkinga til Hetlands, Føroyar og Grønlands. Stoltenberg skal vera hjástæddur í Scalloway í Hetlandi, tá eitt museum verður latið upp í býnum sum eitt 70 ára minni frá seinna heimsbardaga, tá norðmenn høvdu støð har. Hetta hendir 17. mai, á sjálvum tí norska tjóðardegnum. Stoltenberg fer at takka hetlendingum fyri ta hjálp teir veittu norðmonnum, tá Noreg varð hersett av týskarum. Hetlendingar gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at flyta flóttarfólk og mótstøðufólk úr Noregi til Hetlands. Hetta er fyrstu ferð, at ein norskur forsætisráðharri vitjar í Hetlandi. Søguliga hava annars altíð verið tøtt sambond millum Noreg og Hetland, heilt aftur frá víkingatíð. Í eitt tíðarskeið hoyrdu bæði Hetland, Føroyar, Ísland og Grønland til Noreg. Eftir vitjanina í Hetlandi gongur leiðin til Føroya. Steðgurin verður stuttur, helst bara 24 tímar. Enn er skráin fyri Føroyavitjanina ikki almenn. Hugast kann at norski forsætisráðharrin fer at tosa um makrel og møguliga eisini olju, nú norska oljufelagið Statoil stendur á odda fyri leitingini í Føroyum. Sjálvur er Stoltenberg fyrrverandi oljumálaráðharri. At norski forsætisráðharrin vitjar lond, sum forfedrar hansara, norskir víkingar búsettu seg í fyri meira enn 1000 árum síðani, kann eisini vera ein roynd at minnast aftur ta tíðina og tíðarskeiðið eftir tað, har hesi londini vóru undir norsku krúnuni. Við vitjanini vil hann helst undirstrika tey søguligu og mentanarligu bondini, sum hava verið millum hesi londini í Norðuratlantshavi og Noreg og hvør veit bond, sum kanska fara at verða uppaftur tættari knýtt komandi árini, bæði tá tað um vinnu og mentan ræður. Bæði fiskivinna og oljuvinna hava og kunnu fáa stóran týdning fyri framtíðina hjá umrøddu londum.